SUNDA KOMMUNA

# KUNNGERÐ

## um broyting í byggisamtyktini fyri Sunda kommunu.

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Sunda kommuna á bygdarráðsfundi tann 30.03.09 hevur samtykt, at gera niðanfyristandandi broytingar í byggisamtyktini fyri Sunda kommunu.

Samtykt á bygdaráðsfundur 30.03.09

Víðka ídnaðarøki Undir heygum við Norðskála

Alt ídnaðarøki verður víðka soleiðis, at verandi ídnaðarøki eisini umfatar fjøruna matr. nr. 6d og sjóøki frá einari beinari linju eftir markinum millum matr. nr. 6a og 17a og norður til eina beina linju eftir norðaru avmarking á núverandi ídnaðarøki og út til eina linju, ið gongur gjøgnum ytstu punktini á atløgubryggjuni.

Kort í vísir viðtiknu broytingina liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð

**frá mánadegi 06.04.09 til mikudagin 29.04.2009 báðir dagar íroknaðir.**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Sunda kommuna í hendi í seinasta lagi mándagin 6. juli 2009.

*Oyrarbakki tann 02.04.2009*

**Sunda kommuna**
Postboks 10
Oyrarbakkavegur 3
400 Oyrarbakki



# Húsvognar til sølu

Vit hava 2 leiguvognar til sølu við sera góðum avslættri. Vognarnir hava 12v skipan, fortelt og annars alt ið krevst til kampingtúrin.

**Ring 218 540**

# Sernámsdepilin
Barna- og ungdómspsykiatriin

**Sernámsdepilin og Barna- og ungdómspsykiatriin skipa fyri skeiði 6. mai 2009 um**

## Autismu, ADHD/DAMP og tilknýtistrupulleikar v/Christopher Gillberg, professara

Týsdagin 6. mai kl. 9 – 15 skipar Sernámsdepilin saman við Barna- og ungdómspsykiatriini fyri skeiði í auluni á Føroya Læraraskúla. Skeiðið er um Autismu, ADHD/DAMP og tilknýtistrupulleikar hjá børnum og ungum.

Tá fer Christopher Gillberg, barna- og ungdómspsykiatari og heimskendur granskari við Universitetssjúkrahúsið í Gøteborg, at hava skeið, sum er ætlað foreldrum, lærarum, pedagogum, heilsurøktarfrøðingum, læknum, sálarfrøðingum og øðrum, sum hava við børn og ung at gera.

Lærarar, ið ætla sær á skeiði, skulu søkja um luttøku umvegis skúlaleiðaran.

Tilmelding fer fram við at ringja til Sernámsdepilin tlf. 360200 (Eleina Mikkelsen, skrivari).

Endalig tilmelding er, tá skeiðsgjaldið á 700 kr. er flutt á konto 9181- 1615752.

Íroknað skeiðsgjald er kaffi, te og middagsverður.

Seinasta freist at melda til er fríggjadagin 1. mai 2009.

# FØROYA REIÐARAFELAG
FAROESHIPOWNERS´ ASSOCIATION

Føroya Reiðarafelag søkir eftir skrivara at arbeiða hálva tíð at byrja skjótast gjørligt. Uppgávurnar eru vanligar skrivstovuuppgávur.

**Vit vænta av umsøkjaranum, at viðkomandi:**
- hevur skrivstovuútbúgving ella royndir sum skrivari
- dugir bókhald
- hevur góð samstarvsevni
- kann arbeiða sjálvstøðugt

Áhugað kunnu seta seg í samband skrivaran, Finnbjørg Nattestad, á tel 31 18 00 ella 21 18 02.

**FØROYA REIÐARAFELAG**
Gongin 10 | Postboks 361
110 Tórshavn | shipowner.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!



## Sethúsini, M. Heinasonargøta 22

til sølu, um hóskandi boð fæst.

Húsini eru uml. 100 ár, men vórðu høvuðsumvæld uttan fyri o.u. 20 árum síðani.

Grundflatan hjá húsunum er 51 $m^2$
við tilbygningi 25 $m^2$.

Húsini eru í 3 hæddum
Kjallarin er lutvíst innrættaður.
Loftshæddin hevur trimpul og kvist.
Grundsøkið er 152 $m^2$.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**POUL HANSEN, ADV.**
Áarvegur 1 · Boks 52 · 110 Tórshavn · Tel 31 15 78
Fax 31 83 75 · phjadvo@post.olivant.fo

# Heilafelagið

Aðalfundur verður týsdagin
7. apríl kl. 18 í MBF húsinum

GISTING V/MORGUNMATI · SKEIÐ · FUNDARVIRKSEMI



Hotel Runavík
Sjómansheimið



Tel. 238877 · info@hotelrunavik.fo · www.hotelrunavik.fo

# HSR

Aðalfundur verður í neystinun mikudagin tann 15. apríl kl. 19.00.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**